# Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 4

ISSN 0907-905X


Nr. 10 26. februar 2010

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 107 frá 17. august 2009 um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 3, 3. pkt. verður „hvørjar 1000 íbúgvar“ broytt til „hvørji 1000 kirkjufólk.“
2) Í § 45, stk. 1., 3. pkt. verður „nummarrøð“ broytt til „bókstavarøð“

**§ 2**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. februar 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 91/2009

Nr. 11 26. februar 2010

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 17. august 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 9, stk. 4 verður aftaná „avreiðing av veiðu uttanlands" sett „til 25% av veiðuni, gjørd upp 4. hvønn mánað".
2) § 19 verður orðað soleiðis:
   **"§ 19**. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um, at tal av nýttum fiskidøgum, ella nýtslan av egnari árskvotu, skal hækkast við upp til 30%, um meira enn 25% av veiðuni, gjørd upp 4. hvønn mánað, ikki fer um eina føroyska innvigingarskipan. Landsstýrismaðurin kann loyva øðrum skipum í bólkinum at veiða kvoturnar, sum verða roknaðar sum nýttar.
   *Stk. 2.* Tá avreiðing av veiðu uttanlands er avmarkað við heimild í § 9, stk. 4, og skip avreiða meir enn loyvdu nøgdina uttanlands, skal eigari av fiskifari, sum ikki er undir fiskidagaskipan, rinda avgjald. Avgjaldið verður roknað sum 30% av søluvirðinum av tí nøgd, sum er avreidd ov nógv uttanlands.
   *Stk. 3.* Tá fiskidagar ella egin árskvota verða hækkað eftir reglum við heimild í stk. 1, verður hækkingin fyri seinasta uppgjørda tíðarskeiðið í einum fiskiári tikin av rættindunum hjá loyvishavara komandi fiskiárið."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2010.

Tórshavn, 26. februar 2010

**Kaj Leo Johennesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 75/2009

Nr. 12 26. februar 2010

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum verður í § 7, stk. 1, nr. 8 „2010" broytt til: „2015".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010.

Tórshavn, 26. februar 2010

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 65/2009

## Kunngerð um broyting í kunngerð um sjálvbodna trygging

**§ 1**

Í kunngerð nr. 63 frá 16. september 2004 um sjálvbodna trygging, sum seinast broytt við kunngerð nr. 24 frá 24. mars 2009, verður § 6, stk. 1 orðað soleiðis:

„§ **6**. Tryggingargjaldið til sjálvbodnu tryggingina sambært § 21 í dagpeningalógini, verður fyri tíðarskeiðið 1. apríl 2010 til 31. mars 2011, kr. 5.437.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. apríl 2010.

Almannamálaráðið, 2. mars 2010

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)